# 200 á Iceland Airwaves

**Í oktober spælir 200 tvær konsertir í Reykjavík, tann eina verður á víðagitna íslendska tónleikafestivalinum Icelandic Airwaves**




KONSERT

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tá stóri íslendski tónleikafestivalurin Iceland Airwaves fer av bakkastokki í døgunum 19. til 23. oktober, verða føroysku punkararnir í 200 við. 146 bólkar, einstaklingar og plátuvendarar fara á pallin á festivalinum hesar dagarnar.

Her er talan um ein rimmar festival, og hóast einki spælistað eru kunngjørt fyri konsertina við 200, sum verður 22. oktober, so er eingin ivi um, at Airwaves hava jaligar kenslur fyri 200. Á heimasíðuni verður bólkurin skamróstur, og orðini hjá størsta íslendska punkaranum Siggi Punk, um fyrstu útgávuna hjá bólkinum verða tikin fram. "Um tú ikki hevur hoyrt føroyskan punk, hevur tú onga fatan av hvat punkur veruliga er" Stór orð frá einum manni, sum er ímyndin av íslendskum punki.

Fyrr hava bólkar sum Suede, Sigur Rós, Gus Gus, Apparat Organ Quartet og The Flaming Lips, The Hives, Fatboy Slim, Sparta og Thievery Corporation spælt á Airwaves. Festivalurin fær alsamt størri viðurkenning og er vorðin ein sannur sýnisgluggi, har hópin av fólki úr tónleikaídnaðinum luttekur.

Konsertirnar verða hildnar í miðbýnum í Reykjavík, eini 4-6 spælistøð eru karmar um størru tiltøkini, meðan smáar barrir og kafe'ir verða karmur um smáu tiltøkini.

Hetta verður annað vikuskiftið á rað, at 200 spæla í íslendska høvuðsstaðnum, tí vikuskiftið fyri 14. oktober hita teir upp fyri bólkin Trabant á NASA, ið er eitt av best umtóktu spælistøðum í Íslandi.

Tað eru G!music við Jón Tyril og Sunnevu H. Eysturstein, ið hava skipað fyri, at 200 sleppa til Íslands at umboða føroyskan tónleik.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig. Um kvøldið veksur hann vindin upp í strúk av landsynningi og møguliga regn.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn. Seinnapartin hækkar hann upp í landnyrðing og ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin hvassur vindur av norði og ælingur, men hann minkar vindin um kvøldið. Sunnudagin veksur hann vindin aftur upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Hitin millum 6 og 10 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 17 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 22 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 25 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | -- |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 966 hPa. vestan fyri Føroyar fer í landnyrðing og grynnist nakað.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Skotlandi fer spakuliga í landnyrðing. Ein veikur hátrýstryggur vestan fyri Ísland verður yvir Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/9 kl. 06[00]– 27/9. 06[00]. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í sept.: - 0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 23,5 mm – mált frá 26/9 kl. 06[00]– 27/9 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 387,5 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

25. september Seinna kvarter
28. september Mánin longst frá jørðini
3. oktober Tendring

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. Sept | 04.10 | 16.33 | 03.10 | 15.33 | 03.25 | 15.48 | 06.10 | 18.33 | 07.10 | 19.33 | 02.25 | 14.48 | 01.25 | 13.48 | 04.25 | 16.48 | 05.25 | 17.48 | 03.55 | 16.18 | 05.10 | 17.33 |
| 29. Sept | 04.52 | 17.12 | 03.52 | 16.12 | 04.07 | 16.27 | 06.52 | 19.12 | 07.52 | 20.12 | 03.07 | 15.27 | 02.07 | 14.27 | 05.07 | 17.27 | 06.07 | 18.27 | 04.37 | 16.57 | 05.52 | 18.12 |
| 30. Sept | 05.30 | 17.49 | 04.30 | 16.49 | 04.45 | 17.04 | 07.30 | 19.49 | 08.30 | 20.49 | 03.45 | 16.04 | 02.45 | 15.04 | 05.45 | 18.04 | 06.45 | 19.04 | 05.15 | 17.34 | 06.30 | 18.49 |
| 1. okt. | 06.06 | 18.24 | 05.06 | 17.24 | 05.21 | 17.39 | 08.06 | 20.24 | 09.06 | 21.24 | 04.21 | 16.39 | 03.21 | 15.39 | 06.21 | 18.39 | 07.21 | 19.39 | 05.51 | 18.09 | 07.06 | 19.24 |
| 2. Okt. | 06.41 | 18.58 | 05.41 | 17.58 | 05.56 | 18.13 | 08.41 | 20.58 | 09.41 | 21.58 | 04.56 | 17.13 | 03.56 | 16.13 | 06.56 | 19.13 | 07.56 | 20.13 | 06.26 | 18.43 | 07.41 | 19.58 |

5 707265 100036 >